# NSÍ gjørt sáttmála við Tryggingarfelagið Føroyar



*Henry Olsen frá Tryggingarfelagnum Føroyar og Hans Petur Ellingsgaard frá leiðslubólkinum hjá NSÍ skriva undir sáttmálan. Aftanfyri standa Jógvan Martin Olsen, nýggjur venjari, og brøðurnir Helgi og Sonni L. Petersen*

**NSÍ og Tryggingarfelagið Føroyar hava skrivað undir ein stuðulssáttmála fyri komandi ár, og hetta er fjórða árið á rað, at feløgini bæði samstarva**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

– Málið hjá okkum er at blanda okkum millum fremstu liðini í fótbóltskappingini, og tað haldi eg, vit hava møguleika til, nú liðið er styrkt við trimum spælarum, umframt at vit eisini hava fingið nýggjan venjara og hjálparvenjara, sigur Hans Petur Ellingsgaard, formaður í leiðslubólkinum hjá NSÍ, nú stuðulssáttmáli er undirskrivaður.

Í seinastu viku skrivaðu NSÍ og umboð frá Tryggingarfelagnum Føroyar undir ein stuðulssáttmála, ið er galdandi í eitt ár. Sáttmálin fevnir um eina grundupphædd, men hevur eisini eina bonusskipan, so at NSÍ fær meira burturúr, jú hægri liðið endar á stigatalvuni í hesum kappingarárinum.

Hetta er fjórða árið á rað, at NSÍ og Tryggingarfelagið Føroyar samstarva við einum stuðulssáttmála, og tað ber boð um, at bæði feløgini eru væl nøgd við samstarvið, sum hevur verið.

Henry Olsen frá tryggingarfelagnum sigur, at tað fremur áhugan hjá teimum framhaldandi at stuðla felagnum, nú tað hevur styrkt munandi um hópin. Uppgávan hjá Tryggingarfelagnum Føroyar er so at skapa fíggjarligar karmar hjá felagnum at virka undir.

NSÍ hevur fingið tríggjar nýggjar leikarar, og teir eru Pól Thorsteinsson, sum kemur úr B36, og teir báðir runavíkingarnir Helgi L. Petersen og Óli Hansen, sum báðir hava spælt við GÍ í tvey ár. Venjari verður toftamaðurin Jógvan Martin Olsen.

Harumframt hevur NSÍ sett Áka Andreasen í starv sum samskipara, og hann skal bøta um raksturin og stýringina av sjálvum felagnum.

NSÍ er farið undir sjálva venjingina til komandi kappingarár, og eini 20-25 spælarar hava verið til venjingar.

## 1. DEILD

**HT 2 - KTF 0-4**

| | |
|---|---|
| Luitjen Apol (1955) - Rani Nolsøe (2185) | 0-1 |
| Jóhan Gaard (1810) - Steintór Rasmussen (2090) | 0-1 |
| Óli Joensen (1790) - Tummas M. Antoniussen (1965) | 0-1 |
| Jógvan Næs (1715) - Finnbjørn Vang (1965) | 0-1 |

**TFS - VT 1-3**

| | |
|---|---|
| Martin Brekká (2060) - IM John Rødgaard (2315) | 1-0 |
| Finnbjørn Zachariasen (2050) - Torbjørn Thomsen (2210) | 0-1 |
| Gunnar Joensen (1790) - John Jacobsen (1910) | 0-1 |
| Bergur Magnussen (1735) - Kári Durhuus (1745) | 0-1 |

**HT - KT 3-1**

| | |
|---|---|
| Martin Poulsen (2090) - Hans K. Simonsen (2070) | 0.5-0.5 |
| Olaf Berg (2055) - Bernhard Thomsen (1980) | 1-0 |
| Herluf Hansen (2035) - Eyðálvur Johannesen (1680) | 0.5-0.5 |
| Andrias Ziska (1915) - Alvin Joensen (1640) | 1-0 |

**Støðan eftir 7. umfar**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | KTF, Klaksvík | 5-2-0 | 0 | 20.5 |
| 2. | HT, Tórshavn | 4-3-0 | 0 | 17.5 |
| 3. | VT, Vestmanna | 4-1-2 | 0 | 17 |
| 4. | KT, Kollafjørður | 2-2-3 | 0 | 11.5 |
| 5. | TFS, Hvalvík | 1-1-5 | 0 | 10 |
| 6. | HT 2, Tórshavn | 0-1-6 | 0 | 7.5 |

## 2. DEILD

**RT - KTF 2 3.5-0.5**

| | |
|---|---|
| Rúni Jacobsen (1725) - Ingolf Gaard (1745) | 0.5-0.5 |
| Brandur K. Jacobsen (1655) - Ebbe F. Petersen (1215) | 1-0 |
| Henrik W. Joensen (1655) - Mannbj. Anthoniussen (1180) | 1-0 |
| Eyðun Lamhauge (1645) - Rani Tómasson (1185) | 1-0 |

**TT - GT 2.5-1.5**

| | |
|---|---|
| Jens Kristian Hansen (2165) - John Joensen (1750) | 0.5-0.5 |
| Helgi Joensen (1740) - Jákup F. Joensen (1715) | 0.5-0.5 |
| Wensil Højgaard (1730) - Reinhold Isaksen (1710) | 0.5-0.5 |
| Justines Hansen (1650) - Kári Mørkøre (1155) | 1-0 |

**VT 2 - ST 2.5-1.5**

| | |
|---|---|
| Jákup á R. Andreasen (1655) - Torkil Nielsen (2080) | 1-0 |
| Jón Mikkelsen (1655) - Bernhard Augustinussen (1835) | 0.5-0.5 |
| Joen Pauli Johannesen (1465) - Jónfinn Thomsen (1795) | 1-0 |
| Niels O. Durhuus (1365) - Gutti Petersen (1630) | 0-1 |

**Støðan eftir 7. umfar**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | TT, Toftir | 6-0-1 | -1 | 18.5 |
| 2. | ST, Sandavágur | 4-1-2 | 0 | 17.5 |
| 3. | RT, Runavík | 2-4-1 | 0 | 16 |
| 4. | VT 2, Vestmanna | 2-2-3 | 0 | 11 |
| 5. | KTF 2, Klaksvík | 2-0-5 | 0 | 10.5 |
| 6. | GT, Gøta | 1-1-5 | 0 | 9.5 |

## 3. DEILD

**Rókur - VT 3 3-1**

| | |
|---|---|
| Petur Sumberg (1635) - Ingolf Debes (1345) | 0.5-0.5 |
| Árni M. Dam - Jóhannus Johannesen (1105) | 0.5-0.5 |
| Thordur Andreasen - Rógvi Hansen (1075) | 1-0 |
| Bergur Johannesen (1355) - Finnur Johannesen | 1-0 |

**KT 2 - HT 4 1-3**

| | |
|---|---|
| Hanus Joensen (1790) - Jóhan E. Hansen (1760) | 0-1 |
| Niclas M. Joensen (1725) - Poul Poulsen (1720) | 0.5-0.5 |
| Karl L. Johansen (1680) - Hans Birgir Højgaard (1660) | 0-1 |
| Hans Petur Joensen (1655) - Jákup D. Joensen (1625) | 0.5-0.5 |

**ST 2 - HT 3 0-4**

| | |
|---|---|
| Rógvi Jacobsen (1755) - Suni Ziska (1760) | 0-1 |
| Heri Christoffersen (1600) - Súni Jacobsen (1685) | 0-1 |
| Magni Thomassen (1495) - Jón Andreasen (1610) | 0-1 |
| Ari Thomassen - Ronny í Lon (1440) | 0-1 |

**Støðan eftir 7. umfar**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | HT 3, Tórshavn | 5-2-0 | 0 | 20.5 |
| 2. | HT 4, Tórshavn | 4-0-3 | 0 | 16 |
| 3. | ST 2, Sandavágur | 4-1-2 | 0 | 15.5 |
| 4. | Rókur, Oyri | 3-0-4 | 0 | 11 |
| 5. | KT 2, Kollafjørður | 2-2-3 | -3 | 10 |
| 6. | VT 3, Vestmanna | 0-1-6 | 0 | 7 |




VHF telefonin
til skip og bátar



post ordrar verða avgreiddir

Nú einans
kr. 2.975,-

Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045



DRYKKIR
at taka við út úr húsinum

| | |
|---|---|
| KAFFI koppur | 12,- |
| krúss | 15,- |
| ESPRESSO einkultur | 15,- |
| dubultur | 20,- |
| CHOCOKAFFI | 20,- |
| ESPRESCHOCO | 20,- |
| CAPPUCINO | 20,- |
| CAFÉ AU LAIT | 20,- |
| CAFÉ LATTÉ | 20,- |

livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25



SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

Heimasíðusmíð
við Adobe GoLive

- 3-daga grundskeið
11/02 . 12/02 . 13/02 kl. 08:30-15:30
- 1-daga framhaldsskeið
14/02 kl. 08:30-15:30
- 2-tíma fyrilestur:
"Tips & Tricks til hjemmesider"
15/02, fyrra- og seinnapartin

**Skeiðleiðarin:**
*Michael Vogelius* hevur egna teknistovu, hann er eisini fyrilestrarhaldari hjá Adobe og blaðstjóri við ábyrgd fyri webdesign á blaðnum *Digital Design*.

TEL 320 204 http:\\kvasir.farodane.fo



Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið

Turkitrumla
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan tempereatur



prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



Talvsamband Føroya

**Barna- og ungdómskapping í talvi á Oyrarbakka**
**Eydnan leygard. 02.02.02 kl. 10:00**

Fyrsta liðkappingin í røðini av trimum barna- og ungdómskappingum verður á Oyrarbakka 2. februar, næsta verður 3. mars í Tórshavn og triðja verður í Gøtu 16. mars.
TSF arbeiðir við at fáa eitt endaumfar í Norðurlandahúsinum eftir páskir.

**4 á hvørjum liðið + 1 eyka!**

Tilmeldingarfreistin er hóskvøldið 31. januar og fer fram við at ringja til Berg Johannesen á tlf. 210056 ella senda honum ein teldupost:
Sí "Talvtos" á www.faroechess.com

berglis@post.olivant.fo

Talvfelagið
RÓKUR



Almennir fundir hjá Skopunar Bygdarráð 2002

verða hesar dagar á kommunuskrivstovuni:

| | |
|---|---|
| 24. januar | 21. februar |
| 21. mars | 19. apríl |
| 16. mei | 27. juni |
| 25. juli | 29. august |
| 19. september | 24. oktober |
| 21. november | 19. desember |

Allir fundirnir verða kl. 18.00.

Møguliga avlýstir fundir ella broytingar verður kunngjørt í kunngerðartalvuni.

Kommunuskrivstovan er opin:

*mánadag – fríggjadag kl. 11.00 – 15.00.*

**Skopunar Kommuna**



Hvalbiar sóknar Javnaðarfelag

Aðalfundur

Aðalfundur í Hvalbiar sóknar Javnaðarfelag verður hóskvøldið 31. januar kl. 18.00 á Vesturskinið.

Evnið: Samanlegging við hini feløgini í oynni.

**Nevndin**



Genta/drongur

Vit søkja gentu/drong at arbeiða í shawarma grill í Runavík.

Áhugaði ringið á

**tlf. 448237 ella 424774**



Í samband við upprudding á goymsluni selja vit hesi H-vindeygu fyri serprísir:



2 stk. 120x160
2 stk. 140x150
1 stk. 60x70 (føst ramma)
1 stk. 110x150
1 stk. 110x120
1 stk. 100x120
1 stk. 120x160 (v/tvørsprossum)
1 stk. 150x210 (rútapartí við loddrøttum sprossum og ráglasi)

Vestmanna Timburhandil
Telefon 472000